# Væl fyriskipaður bátafestivalur

**– Eg haldi, at stevnuøkið var hugnaligt, og festivalurin var væl fyriskipaður, sigur Birgir W. Høgnesen, sum er maðurin, ið tók stig til fyrsta bátafestivalin í nýggjari tíð**

FESTIVALUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Birgir W. Høgnesen er upphavsmaðurin til tiltøkini við bátafestivalum. Hann er ættaður úr Klaksvík, men hevur í mong ár búð í Vestmanna, har hann eisini tók stigið til fyrsta bátafestivalin fyri fimm árum síðan.

Sosialurin hitti Birgir við bátahylin á Toftum leygardagin, tá ið teir út við fimmti bátarnir stevndu av Flesjunum og heim í Oyrarnar.

Tað er bróðir Birgir, Høgni W. Høgnesen, sum er primus-motorurin aftanfyri bátafestivalin á Toftum, sum nú hevur tvey ár á baki.

Høgni hevur búð á Toftum í nógv ár.

### Góð fyrireiking

Birgir W. Høgnesen heldur, at góð fyrireiking liggur aftanfyri bátafestivalin á Toftum.

– Hetta sær bara heilt gott út. Eg havi hugt út á stevnuøkið, og eg haldi, at tey, sum standa aftanfyri tiltakið, hava dugað væl at skapt eitt hugnaligt og áhugavert umhvørvi rundan um festivalin.

Hann heldur eisini, at Bátafelagið í Nes kommunu hevur dugað væl at lagt eina áhugaverda skrá, har okkurt er til tey flestu, bæði ung og tilkomin.

### Tiltakið væleydnað

Formaðurin í Bátafelagnum í Nes kommunu, Høgni W. Høgnesen, sigur í morgun, at enn er ikki gjørt upp, hvussu nógv vitjandi hava verið á festivalinum.

– Men eg haldi, at nakað meira av fólki hevur verið hesaferð enn seinasta ár, sum var okkara fyrsta.

Hann sigur, at nevndin í felagnum ikki hevur eftirmett tiltakið, og tí dugir hann heldur ikki at siga, hvussu verður komandi ár.

– Vit fara at bátafestivalin og taka støðu til, hvussu verður framyvir, sigur Høgni.

Undan tiltakinum, segði nevndin í Bátafelagnum, at ætlanin er, at bátafestivalurin á Toftum skal verða eitt aftvurvendandi árligt tiltak, sum eisini skal seta kommununa í fokus.

### Gjørdi bart...

Sosialurin hevur skilt, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan seint leygarkvøldið kravdi, at hølini hjá Landingarmiðstøðini, har ætlaði dansurin skuldi verða, lótu aftur. Tí noyddust fyrireikararnir at flyta dansin við Dansiorkestrinum niðan á Svangaskarð, meðan DJ-Showið, sum var fyri tey ungu, var í tjaldinum á stevnuøkinum.

Høgni W. Høgnesen sigur seg onga viðmerking hava til, at neyðugt varð at flyta dansin, tí hetta í fyrsta lagi er ein spurningur millum Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Landingarmiðstøðina.

– Vit hava ongar viðmerkingar til hesa avgerð, sigur hann at enda.





*- Eg haldi, at bátafestivalurin á Toftum var væl fyriskipaður, og umhvørvið rundan um stevnuøkið var hugnaligt, sigur Birgir W. Høgnesen Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Harmonikuspælarar settu sín serstaka dám á, meðan bátsfólkið fekk feska suppu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Óhapp í Leirvíkartunlinum kundi endað við stórskaða

**Eitt ferðsluóhapp í Leirvíkartunlinum leygarmorgunin kundi havt álvarsligar fylgir við sær, um verri vildi til**

FERÐSLA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Óhappið hendi, tá ið ein ung kvinna, sum hevði verið í Gøtu og keypt morgunbreyð, var á veg heimaftur gjøgnum tunnilin til Leirvíkar.

Tá ið hon nærkaðist endanum av tunlinum leirvíkarmegin, møtti kvinnan einum mótkoyrandi bili, sum hon helt koyrdi í skeivari síðu – og ímóti henni.

Í eini roynd at umgangast samanstoyt, snaraði hon til vinstru. Í ferðini misti kvinnan tamarhaldið á bilinum og rendi inn í tunnilsveggin í vinstru síðu og slongdist síðan omanaftur í tunnilsveggin í høgru síðu.

### Slapp væl

Sosialurin var av tilvild á staðnum stutt eftir, at óhappið var hent.

Unga kvinnan hevði fingið ilt í høvdið og kom undir læknahond. Annars hevði hon eingi sjónlig av hendingini.

Bilførarin í bilinum, sum koyrdi ímóti kvinnuni, steðgaði ikki, og tí veit eingin – uttan bilførarin sjálvur, um – og hví – hann fór skeivur á breytini og koyrdi í øvutari síðu.

Hendingin kundi fingið álvarsligar fylgir, um verri vildi til.

### Sat í seðlum

Løgreglan í Runavík sigur, at unga kvinnan sat í seðlum, og at hetta avgjørt var ein orsøk til, at hon slapp so væl burtur úr hendingini.

– Vit vita ikki rættiliga, hvussu hendingin er farin fram, og vit hava ongan tikið í hesum sambandi. Vit hava tískil bara frágreiðingina hjá kvinnuni at halda okkum til, sigur løgreglan í Runavík.



*Tað var stutt inni í tunlinum leirvíkarmegin, at ferðsluóhappið hendi leygarmorgunin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*